# Stuðulsgrunnur Føroya Blindafelagsins

Umsóknir um peningaligan stuðul úr Stuðulsgrunninum skulu vera grunninum í hendi í seinasta lagi 22. mars 2002.

Umsóknarbløð fáast hjá Føroya Blindafelag:

Adr.: Føroya Blindastovnur
Íslandsvegur 10A
100 Tórshavn
Tlf.: 318222

Endamálgrunnsins er:

- At veita hjálp til blind og sjónveik, ið til fánýtis hava søkt hjálp.
- At veita stuðul til luttøku á skeiðum, fundum og øðrum tiltøkum fyri sjónbrekað í Føroyum og uttanlanda – tó treytað av, at umsøkjarin er limur í Føroya Blindafelag.

**Nevndin**

## Fráboðan um umhvørvis-góðkenning

Við hesum verður gjørt kunnugt, at Heilsufrøðiliga starvsstovan tann 7. mars 2002, við heimild í grein 26 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktbober 1988 um umhvørvisvernd og kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994 grein 1, stk. 4, hevur góðkent:

**Flytføru súrløgukókiskipanina hjá Faroe Salmon**

***Gjørt verður vart við, at skipanin sambært umhvørvisgóðkenningini kann koma at virka í øllum kommunum í Føroyum, treyta av at kommunan gevur loyvi.***

Góðkenningin liggur alment frammi á Heilsufrøðiligu starvsstovuni. Avgerðin kann kærast til Føroya Landsstýri. Møgulig kæra skal sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni, Falkavegur 6, 2. hædd, FO–110 Tórshavn, í seinasta lagi fýra vikur frá dags dato.

Góðkenningin kann somuleiðis síggjast á heimasíðuni hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni, www.hfs.fo

**Heilsufrøðiliga starvsstovan**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Stuðulspedagogar/hjálparfólk

Stuðulsfólkaskipanin í Tórshavnar kommunu søkir við hesum eftir stuðlum til Bridgehúsið og til komandi uppgávur í Familjudeildini.

**Størvini**
Bridgehúsið er eitt frítíðartiltak fyri børn og ung menningartarnaði aftan á skúlatíð.

Søkt verður eftir fólki 20 tímar um vikuna skjótast gjørligt til 17 ára gamlan drong og 25 tímar um vikuna til 11 ára gamla gentu í Bridgehúsinum.

Eisini verður søkt eftir fólki til Familjudeildina: eitt nú 25 tímar um vikuna til 4 ára gamlan drong í barnagarði.

Nýggjar arbeiðsuppgávur eru á veg, tí verður samstundis søkt eftir fólki til stuðulsliðið, fulla ella parttíð.

**Førleikakrøv**
Ynskiligt er, at umsøkjarin:
- er sjálvstøðugur og dugir at skipa arbeiðið
- hevur royndir við børnum og innan sosialpedagogiska arbeiðsøkið.
- hevur hug og evni at arbeiða við børnum og familjum við serligum tørvi.
- er búgvin, torir at tosa um forðingar og er opin fyri menning í arbeiðinum.

**Setanarviðurskifti**
Sum liður í arbeiðinum verður skipað fyri ráðgeving og skeiðvirksemi.

Størvini verða sett skjótast til ber. Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya landsstýri.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Honnu Jacobsen, leiðara , Jákubinu Hansson ella Birgit Debess, pedagogiskar ráðgevarar tlf. 315160, og ert tú vælkomin at seta teg í samband við okkum at hoyra nærri.

**Umsókn**
saman við upplýsingum um útbúgving og royndir og møguligum viðmælum skal vera Tórshavnar kommunu, Postrúm 32, 110 Tórshavn í hendi skjótast gjørligt, tó í seinasta lagi 24. mars 2002. Viðmerk á umsóknina "Stuðulsfólkaskipanin"

SNARSKIVAN








ADC-Heilsølan
Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893
ARBEIÐSHANDSKAR
Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi
LANDSINS STØRSTA ÚRVAL
frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar
ADC
BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA



Atlas Copco
STEMPIL OG SKRÚVU KOMPRESSARIR
Stationerir og transportablir størri samt smærri
Fáast í flestum støddum til øll endamál verkstøð. fiskavirkir, alibrúk, entreprenørar v.m.
Kaj Andreasen & Co
Heilsøla, smásøla og umboð - Tel. 315600 - Fax 318008




Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo




TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Pleyguforeldur

Søkt verður eftir familju í Suðurstreymoy, helst í Tórshavn, at verða pleyguforeldur hjá einum 4 ára gomlum drongi.

Talan er um ein drong, ið hevur tørv á umsorgan og at verða stimbraður í einum skipaðum gerandisdegi við tryggleika og reglusemi.

Tí er neyðugt, at annað av foreldrunum verður heima hjá dronginum í minsta lagi tað fyrsta árið, og at tað ikki eru onnur smábørn í heiminum.

Tað er ein fyrimunur, um pleyguforeldrini hava pedagogiska bakgrund, og er tað ein treyt at tikið verður móti ráðum og vegleiðing frá psykologi.

Somuleiðis skulu pleyguforeldrini vera samstarvssinnað og stuðla tí regluligu samveruni, sum drongurin kemur at hava við foreldur síni.

Gjølligari upplýsingar fáast við at venda sær til Sosialu deild á tlf. 315160 og spyrja eftir Onnu Mariu Troest, sosialráðgeva.

Skrivlig umsókn verður í seinasta lagi tann 22. mars 2002 at senda til:

Tórshavnar kommunu, Sosialu deild, postrúm 32, 110 Tórshavn.

SNARSKIVAN

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3309
Navn: Sp/f Bula
Adressa: 370 Miðvágur
Kommuna: Miðvágs Kommuna
Stovningardato: 14.01.2002
Viðtøkudato: 14.01.2002
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kr. 80.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.
Stovnari: Helena Joensen, 370 Miðvágur.
Stjórn: Karlo Jógvan Sofus Joensen, 370 Miðvágur.
Tekningarreglur: Felagið verður bundið við undirskrift avstjórnum.
Grannskoðari: : Sp/f KPMG, statsaut. revisorar, Staravegur 17, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 14.01.2002 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er at reka fiskivinnu, keyp og søla umframt aðra vinnu, ið stendur í samband við nevnda rakstur.

Skráseting Føroya tann 7. mars 2002

Kristin Balle

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3330
Navn: Sp/f Fofish
Adressa: 600 Saltangará
Kommuna: Runavíkar Kommuna
Stovningardato: 06.02.2002
Viðtøkudato: 06.03.2002
Kapitalur: Kr. 100.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kontant kr. 100.000,00 til kurs 100.
Stovnarar: Leif Høj, Hjallavegur, 600 Saltangará og Abraham Gotfred Løkin, Leitisvegur, 600 Saltangará.
Stjórn: Leif Høj, Hjallavegur, 600 Saltangará og Abraham Gotfred Løkin, Leitisvegur, 600 Saltangará.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av einum stjóra.
Grannskoðari: : P/F Rasmussen & Weihe, á Glaðsheyggi, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 06.03.2002 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er at keypa og selja fisk, útflyta fiskavørur, handil og annað starv í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 7. mars 2002

Kristin Balle

Útbjóðing

## Mykinesarleiðin

SL fara við hesum alment at bjóða út rutusiglingina á Mykinesarleiðini. SL hava sum samferðslueind, vegna landið, til uppgávu at samskipa sjóvegis og landvegis samferðslu, herundir planleggja, stýra og hava eftirlit við rutusiglingini hjá landinum.

**Útbjóðingin fevnir um**

| ***Øki*** | ***Leið*** |
|---|---|
| Mykinesarleiðin | 36. Sørvágur – Mykines |

Harafturat ynskja SL at samstarvað verður um flutning, sum er uttanfyri vanligu ferðaætlanina á Mykinesarleiðini, herundir eisini serflutning av ymiskum slagi.

**Krøv**
- Útbjóðingin skal virka fyri, at SL fær fíggjarligar og tænastuligar fyrimunir í rakstrinum
- Sáttmálaskeiðið skal ætlandi byrja 1. mei 2002
- Øll krøv og treytir verða annars ásett í útbjóðingartilfarinum

**Tilboð**
Tilboð, merkt ***Útbjóðing Oyggjaleiðir***, skulu vera innkomin til:

**Strandfaraskip Landsins**
att. Fólkaflutningsdeildin
Postrúm 88
FO-110 Tórshavn

**í seinasta lagi 2. apríl 2002, kl. 12:00.**

SL skilar sær rætt til at velja ímillum innkomin tilboð ella ikki at taka við nøkrum av innkomnu tilboðunum. Teir arbeiðstakarar, sum bjóða, kunnu verða hjástaddir, tá tilboðini verða latin upp. Sæð verður burtur frá tilboðum, sum ikki eru innkomin til tíðina.

Útbjóðingartilfar kann umbiðjast hjá SL, tlf. 343000 ella t-post: pjt@ssl.fo Áðrenn útbjóðingartilfar verður sent út, skulu kr. 1.000,- latast í depositum.

Nærri upplýsingar um útbjóðingina kunnu fáast við at venda sær til Poul Jákup Thomsen, fólkaflutningsleiðara.

STRANDFARASKIP LANDSINS

*Høvuðsuppgávan hjá fyritøkuni er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.*

*Árliga rakstrarætlanin hjá Strandfaraskipum Landsins javnvigar við yvir 150 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 11 skip, 40 bussar og 18 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.*


veitst tú ikki tað? Sosialurin




Dvørgastígur 7
100 Tórshavn
tel 314 555
fax 318 026
hestprent@hestprent.fo

FAROE LAW
bjóðar heimligar og altjóða loysnir.
Tosið við Eyðfinn Jacobsen, advokat um tygara tørv.
Tinghúsvegur 14,4
P.O.Box 1218
FO-110 Tórshavn
tel 359900 · fax 359901 · mob 219902
dania@post.olivant.fo
www.faroe-law.fo



REOLIR
Hædd 2-3 m
Hillar:
30 x 90 cm
45 x 90 cm
60 x 90 cm
75 x 90 cm
90 x 90 cm
Til tey størri goymslurúm bjóða vit stigar og bjálkar til europlattar
Kaj Andreasen & Co
Heilsøla, smásøla og umboð - Tel. 315600 - Fax 318008